## Kvinnurnar nummar 63

Styrkislistin hjá FIFA gerst alsamt hugaligari lestur hjá føroyska kvinnulandsliðnum. Á FIFA-styrkislistanum, sum júst er almannakunngjørdur, eru tær føroysku kvinnurnar nummar 63 av teimum 150 kvinnulandsliðunum, sum eru á listanum. Føroyska kvinnulandsliðið er farið fýra pláss upp, tí seinast vóru Føroyar nummar 67. Svøríki er fremsta norðurlandið á listanum, tí Svøríki er nummar fýra og Danmark nummar seks.



## Dómarin argaði Frem

Tað var rímiliga breið semja eftir dystin millum Frem og Kolding, um at dómarin hevði givið Kolding eina stóra hjálpandi hond. Danskir miðlar skriva, at dómarin gav Kolding tvey brotsspørk, sum vóru tann reini sjónleikur frá Kolding-spælarum. Tað eydnaðist tó Frem við Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen á liðnum at javna til 2-2. Jón Rói Jacobsen var í miðverjuni alla tíðina, og Atli Danielsen var á miðvøllinum, inntil tað restaði eitt korter.

# Heðin vann bæði gull og silvur

**Heðin Nolsøe var í farnu viku við í skíðkappingum í Norra, har hann vann trý heiðursmerki, eitt gull- og tvey silvurmerki. – Tað gekk betur enn væntað, sigur Heðin, sum er blindur, men kortini er so virkin í ítrótti, sum tað ber honum til**

SKÍÐING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Heðin Nolsøe, sum er ættaður úr Trongisvági, men býr í Frederiksund í Danmark, hevur fleiri ferðir fyrr verið til árligu kappingarnar í Beitostølen í Norra, og hann hevur eisini fyrr vunnið heiðursmerki. Men hesa ferð gekk framúr hjá honum.

– Tann besta kappingin hjá mær var mikudagin, tá eg vann gull í 10 kilometra skíðrenning, greiðir hann frá. Tíðin hjá Heðini var 39 minuttir og 39 sekund, men tað gjørdist dramatikkur ímóti endanum. Tó eydnaðist Heðini at vera 13 sekund framman fyri silvurvinnaran, sum var Ferudun Kahraman, ið kemur frá sama felag sum Heðin.

Tvey silvurmerki gjørdist tað eisini til, og tað fyrra vann Heðin Nolsøe mikudagin, tá skíðskjóting á fimm kilometra teininum var á skránni. Har vann Heðin sjálvur annar silvur, tí hann og Ferudun Kahraman høvdu báðir tíðina 29 minuttir og eitt sekund. Teir vóru tveir minuttir og 12 sekund aftan fyri norska vinnaran, Gert Kroken.

– Skíðskjótingin gongur fyri seg upp á tann mátan, at vit hava hoyritelefonir uppi á høvdinum, so vit kunnu »sikta« eftir ljóðinum, vit fáa. Tá tað er upp á tað hægsta, sikta vit beint á málið, og tá ræður so um at trýsta á avtrekkjaran, greiðir Heðin Nolsøe frá.

### Betur enn væntað

Hann megnaði so eisini at vinna silvur leygardagin, tá dagarnar í Beitostølen endaðu við 20 kilometra skíkappingini, Ridderrennet. Heðin hevði tíðina ein tími og 33 minuttir, og hann var eitt lítið korter aftan fyri norska gullvinnaran, Magne Lunde, sum er fyrrverandi OL-landsliðsskíðari fyri blind.

– Eg eri sera væl nøgdur við úrslitini, og tað hevur gingið betur enn væntað. Nú haldi eg, at eg havi uppiborið eina góða feriu, sigur 49 ára gamli Heðin, sum kappaðist í aldursbólkinum 35-49 ár. Tilsamans vóru umleið 350 íðkandi úr 11 tjóðum við til kappingarnar.

Hetta er aðru ferð innan fáar vikur, at Heðin Nolsøe roynir stórar avbjóðingar á skíðum, tí herfyri var hann í Svøríki, har hann var ein av 13.873, sum royndu seg í 90 kilometra longu skíðrenningini, Vasaloppet, sum hann gjøgnumførdi væl og virðiliga.

Á ungum árum fekk Heðin eina eygnasjúku, sum stigvíst gjørdi hann blindan, men ítrótturin hevur fylgt honum alla tíðina og ger tað enn. Í 15 ár var hann fastur maður á danska goalball-landsliðnum, og umframt, at hann var við til paralympisku leikirnar í USA í 1984 og í Suðurkorea í 1988, var hann eisini á danska liðnum, sum í 1985 vann World Cup-gull í Calgary.



*Heðin Nolsøe, sum er blindur, stóð seg væl í skíðkappingunum í norska Beitostølen í farnu viku, tá hann vann eitt gull- og tvey silvurmerki*
*Mynd: Hans Hansen*

# TB og Undri víðari í steypakappingini

**TB vann stórsigur á NÍF og skal skírisdag á heimavølli taka ímóti B36 í kappingini um Løgmanssteypið. Eisini Undri vann seg víðari við sigri á Royn og skal spæla ímóti FC Hoyvík**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Leygardagin lá so mikið nógvur kavi á vøllinum í Miðvági, at steypadysturin millum MB og Skála var útsettur til í kvøld klokkan 18, tá vøllurin vónandi er líka kavafríur sum á myndini…*

TB, sum í fjør hevði eitt skuffandi landskappingarár og bert fekk eitt fjórðapláss, fekk leygardagin eina frálíka byrjan í steypakappingini í ár, tá liðið á heimavølli í innleiðandi umfarinum vann heili 6-0 á NÍF, sum er felagið hjá nólsoyingum.

Gilli Sørensen, sum er komin heimaftur úr Aberdeen, stóð fyri tveimum av málunum, harav hann skoraði, sum gav hálvleiksleiðsluna 1-0. Í seinna hálvleiki sluppu Tórður Mortensen, Gunnleif Olsen, Jan Smedemark og Heini Mortensen upp í part, áðrenn Gilli skoraði til endaliga úrslitið, 6-0.

Sigurin merkir, at TB skírisdag á heimavølli tekur ímóti B36 í fyrsta umfari.

### Undri basti Royn

Eisini Undri FF, sum er nýtt lið í triðbestu mansdeildini í ár, fekk ein sigur í innleiðandi umfarinum í steypakappingini, tá tað í Hvalba eydnaðist at basa Royn.

Undri vann dystin 2-1 og var eisini á odda 2-0 í hálvleikinum. Málskjúttar vóru Hanus Rasmussen og Christian Vilhelm Jacobsen, men hóast Royn, sum nú aftur hevur eitt manslið við í kappingini, í seinna hálvleiki svaraði aftur við máli frá Jóhannes Jespersen, rakk tað bert til at pynta um úrslitið.

Í fyrsta umfari í kappingini um Løgmanssteypið skal Undri FF, sum er eitt av nýggjaru feløgunum, møta einum spildurnýggjum felag, FC Hoyvík, ið somuleiðis er heimahoyrandi í høvuðsstaðarumráðnum.

### MB og Skála í kvøld

Ein triði dystur í innleiðandi umfarinum skuldi eisini havt verið í Miðvági millum MB og Skála, men á vøllinum í Miðvág lá so nógvur kavi, at dysturin kundi ikki spælast. Tí var hann útsettur og er settur at verða í kvøld klokkan 18.

Eisini var ætlanin, at landskappingin í 1. deild hjá kvinnum skuldi byrja leygardagin, men har blivu allir tríggir dystirnir avlýstir. Ikki er greitt, nær dystirnir – KÍ-EB/Streymur, AB/Skála og Víkingur-B68/NSÍ verða spældir.